

## Argjafrensar vitjaðu í Miðlahúsinum

Næmingar í 10. flokki í Argja skúla vitjaðu í Miðlahúsinum týsmorgunin. Tey hava temadagar um fjølmiðlar í hesum døgum saman við lærarunum Lissi Hansen og Brynhild Hansen. Næmingarnir vildu fegnir vita, hvussu ein blaðredaktión arbeiðir. Tey hava fyrr havt næmingar í 10. flokki, sum hava gjørt eitt blað, sum hevur verið býtt út millum skúlanæmingarnar. Í fjør vitjaðu tey eisini á Sosialin, og blaðstjórin Eirikur Lindenskov var tá eisini saman við flokkinum og eftirmetti úrslitið. Tað verður aftur gjørt hesaferð – men hesaferð ætla næmingarnir at gera eina veggavís, sum verður hongd upp í miðhøllini í skúlanum á Argjum.

*Mynd: Jens Kristian Vang*



# KJ-Hydraulik yvirtikið bedingina í Fuglafirði

Viggo Johannesen, sølustjóri hjá KJ-Hydraulik, sigur, at teir fyrst og fremst fara at satsa uppá at gera upphálingar og umvælingar fyri alivinnuna. Við bedingina er ein smiðja, sum er væl egnað til øll tílík arbeiði, eitt nú motorskift.

Bedingin tekur upp allar vanligar útróðrarbátar og eisini smærri trolbátar, og ein stórur partur av arbeiðinum hjá eini slíkari beding er vanligt viðlíkahaldsarbeiði sum botnvask, máling, at skifta sink og at gera smærri umvælingar.

KJ er ein fyritøka við serkunnleika innan hydraulik og maskintøkni. Fyritøkan veitir og serviserar útgerð til fiskiídnaðin, alivinnu á sjógvi og landi, umframt flutningsvinnuna og byggivinnuna. Sum ein av størstu fyritøkunum á maskintekniska økinum í Føroyum, veitir KJ eisini útgerð og tænastur til útlendskar marknaðir, eitt nú til Íslands, Skotlands, Hetlands, Grønlands, Danmarkar og Noregs.

Her er ofta talan um vøru sum ikki kemur heim til Føroya, men verður umpakkað í Danmark og send beinleiðis til kundan haðani. Í løtuni eru starvast umleið 55 fólk hjá KJ Hydraulik.

# Jørgen Niclasen afturvaldur formaður



**Tingbólkur Fólkafloksins hevur í dag afturvalt Jørgen Niclasen til floksformann. Einki mótvalevni var**

POLITIKKUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Floksformaður verður valdur á hvørjum ári, í seinasta lagi á Ólavsøku. Tingbólkurin velur floksformannin. Jørgen Niclasen varð afturvaldur uttan mótvalevni.

Jørgen Niclasen gjørdist formaður fyri flokkin í 2007 og hann skal sostatt undir triðja árið at leiða flokkin.

Jørgen Niclasen rundaði tey 40 fyrr í ár.

Hann sat fyrstu ferð á tingi í 1989, bert 20 ára gamal, og er framvegis tann yngsti sum nakrantíð er komin á ting.

Umframt formansessin er Jørgen uttanríkisráðharri og varaløgmaður.

Hann er giftur við Annelennu Vest, økisleiðara hjá Posta, tey búgva í Sørvági og eiga tey 3 børn - Lindu, Ásvør og Julian.

# Eik stendur framvegis í vøkstri




**Triðja dagin á rað hækkar partabrævið í Eik í stórum lopum. Fyrr í dag var vøksturin 16 prosent, og var partabrævið tilsamans hækkað úr 86 krónum til 145 krónur partabrævið**

PARTABRØV
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Mánadagin, tá virðisbrævamarknaðirnir lótu upp, hevði partabrævið í Eik virði á 86 krónur. Tann dagin vaks virðið á tí við 32 prosentum og endaði á 107 krónum partabrævið. Góða gongdin helt áfram í gjár, tá vaks tað við knøppum 17 prosentum, og endaði á 125 krónum partabrævið. Tann góða gongdin sær út til at halda áfram í dag.

Klokkan 10.20 føroyska tíð var partabrævið vaksið við 16 prosentum, og lá tá á 145 krónum fyri partabrævið.

Sostatt er partabrævið higartil vaksið við tilsamans 82,4 prosentum upp á eina viku, at rokna síðani seinasta mikudag, tá kursurin á partabrævinum var 79,50 krónur fyri partabrævið. Stutt fyri middag var vøksturin í partabrøvunum í Eik minkaður nakað aftur í mun til fyrr á morgninum, og er vøksturin klokkan 11.50 4 prosent fyri dagin.

Partabrævið hjá Føroya Banka hevur mestsum staðið í stað seianstu dagarnar, og liggur enn um 134,50 kr. partabrævið. Kursurin á partabrøvum hevur verið sera støðugur seinasta árið, meðan onnur partabrøv eru rapaði í virði.